umhvørvisstovan

VESTMANNA KOMMUNA
ÚTIBØ
POSTBOX 91
355 VESTMANNA
FØROYAR

Argir hin 10. mars 2011
Málsnr.: 10/00628-12
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Heidi Hansen

**Viðvíkjandi: spillivatnsætlanin hjá Vestmanna kommunu er góðkend**

Við hesum skal verða boðað frá, at Umhvørvisstovan hin 10.03.2011, sambært § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29 oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 4, stk. 2 í kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn, hevur góðkent spillivatnsætlanina hjá Vestmanna kommunu fyri tíðarskeiðið 2011-2015.

Umhvørvisstovan fekk hin 12.10.2010 spillivatnsætlanina til góðkenningar (mál nr. 10/00628-1). Ætlanin er gjørd av HMP Consult, ráðgevandi verkfrøðingum. Í sambandi við viðgerðina av ætlanini, hevur Umhvørvisstovan verið í samband við HMP Consult, og 21.01.2011 varð dagførd ætlan send Umhvørvisstovuni til góðkenningar (mál nr. 10/00628-10).

Út frá eini heildarmeting av upplýsingunum í ætlanini, ið varð send 21.01.2011, verður mett, at komandi spillivatnsskipan í kommununi lýkur ásetingarnar í §§ 8-13 í kunngerðini um spillivatn. Hetta merkir, at spillivatnsætlanin m.a. fevnir um spillivatn frá øllum húsarhaldum, virkjum og virksemi í kommununi, og at spillivatnið eftir reinsing verður leitt gjøgnum lokaða skipan beinleiðis á sjógv við góðum vatnskifti.

Hin 23.02.2011 sendi Vestmanna kommuna Umhvørvisstovuni bræv (mál nr. 10/00628-11), har tað framgongur at Vestmanna kommuna á fundi 22.02.2011 hevur samtykt dagførdu ætlanina, ið varð send 21.01.2011.

Góðkenningin umfatar einans krøv ásett í spillivatnskunngerðini, t.v.s. tann umhvørivsliga partin av spillivatnætlanini. Góðkenningin tekur ikki støðu til hvørjar tekniskar loysnir eru valdar og um teknisku viðurskiftini sum heild eru í lagi, so sum dimensioneringin o.s.fr. Hetta er ábyrgdin hjá kommununi.

Um tað seinni vísir seg, at spillivatnsskipanin elvir til dálking, t.d. uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum, skal kommunan, sambært § 10 stk. 3 í kunngerðini um spillivatn, fremja bøtandi atgerðir, so sum økta reinsing ella føra spillivatnið longur út.

Vinaliga

Jóhanna Olsen, deildarleiðari

/

Heidi Hansen, umhvørvisviðgeri

**Avrit**: sp/f HMP Consult, Óluvugøta 12, 100 Tórshavn